# Ársfrágreiðing
## 2023



Ráðið fyri gransking, menning og nýskapan

**Ársfrágreiðing 2023**

**Útgivið**
Ráðið fyri gransking, menning og nýskapan
og Granskingarráðið

**Sniðgivið**
VIRKA

**Prent**
Føroyaprent

**ISBN**
**978-99972-903-1-1**

# Ráðið fyri gransking, menning og nýskapan

Ráðið fyri gransking, menning og nýskapan er sambært løgtingslóg nr. 89 frá 7. juni 2020 sett at ráðgeva Føroya landsstýri og vinnu um yvirskipaða politikk Føroya við felags hugsjón, sum fevnir um gransking, menning og nýskapan.

Skrivarauppgáva Ráðsins er sambært lógini løgd til fyrisitingina í Granskingarráðnum at røkja.

Ráðið fyri gransking, menning og nýskapan telur formann og seks limir, sum landsstýrisfólkið í granskingarmálum velur eftir persónligum eginleikum og fakligum førleikum. Ráðslimirnir umboða tilsamans vitan um og royndir við gransking, menning og nýskapan bæði alment og vinnuligt. Ein meiriluti av ráðslimunum skal hava granskingarførleika í minsta lagi á lektarastigi, og fleiri skulu hava viðkomandi og drúgvar royndir úr vinnuni.

**Ráðslimirnir eru:**

**Tórheðin J. Jensen**
formaður, DBA, marknaðarførings- og umsitingarleiðari hjá Varðanum

**Annika H. Davidsen**
ph.d., adjunktur í sálarfrøði á Fróðskaparsetri Føroya

**Eyðun E. Jacobsen**
ph.d. í teldufrøði, ráðgevi hjá Klintra

**Gunnvør á Norði**
ph.d. í lívfrøði, granskari á Firum

**Jan Rasmussen**
ph.d., serlækni í hjartasjúkum á Landssjúkrahúsinum

**Ragnheiður Bogadóttir**
ph.d., lektari í samfelagsvísindum á Fróðskaparsetri Føroya

**Sóley H. Hammer**
MA í løgfrøði, leiðari í Hugskotinum

# Formæli

Føroyar standa fyri avbjóðingum, sum mugu loysast. Víðfevndar samfelagsligar og alheimsligar broytingar krevja nýggjar tilgongdir og loysnir. Gransking, menning og nýskapan eru avgerandi amboð til at navigera seg fram til góðar loysnir fyri hesar avbjóðingar og tryggja eina vælferðarríka framtíð.

Hetta er onnur frágreiðingin hjá Ráðnum fyri gransking, menning og nýskapan. Frágreiðingin veitir eina støðulýsing og meting av almennu gongdini viðvíkjandi gransking, menning og nýskapan í Føroyum og av støðuni í mun til altjóða samstarv, umframt tilráðingar í hesum sambandi.

Vit fegnast um at hava fingið hagtøl um gransking, menning og nýskapan í Føroyum. Tey geva okkum eina góða mynd um okkara støðu samanborið við onnur.

Frágreiðingin er ætlað sum grundarlag fyri kunning og kjaki.

Ein avgerandi táttur er, at fíggingin til gransking, menning og nýskapan eigur at verða raðfest. Í løtuni liggja almennu íløgurnar til hetta økið aftan fyri okkara norðurlendsku grannar. Vit mugu økja munandi um almennu íløgurnar, so vit kunnu útbúgva fleiri granskarar til at taka sær av týðandi samfelagsavbjóðingum.

Nýskapanarvistfrøðisskipanin í Føroyum er ófullfíggjað. Hin mest eyðsýndi veikleikin er, at lítið er til av vágafúsum kapitali í Føroyum. Harnæst vantar tættari samband millum partar, sum mugu og eiga at arbeiða saman.

Eisini er sera týdningarmikið at stimbra eina mentan av nýhugsan. Vit skulu raðfesta menniskjaliga tilfeingið fremst, hjúkla um hugskotini og serkunnleikan hjá føroyingum. Tað gera vit við at menna eina nýskapanarstrategi, sum effektiviserar tilgongdir og stimbrar snildir. Her kunnu vit millum annað læra av Íslandi, ið seinastu árini hevur sett fokus á tøkniliga nýskapan.

Tað hevur alstóran týdning at byggja upp eitt sterkt vitanargrundarlag. Vit hava brúk fyri at styrkja útbúgvingarnar, serliga á tøkniligum og handilsligum økjum. Samstarv millum granskingarstovnar, vinnu og námsfrøðiligar eindir eigur at vera í hásæti fyri at skunda undir nýskapan. At seta á stovn ein depil fyri gransking, menning og nýskapan á Fróðskaparsetrinum er ein lovandi leið.

Altjóða samstarv er ein onnur lykladrívmegi fyri framburði. Føroyar hava gjørt avtalu um luttøku í fleiri altjóða samstørvum, sum lata stuðul til verkætlanir. Vit mugu gagnnýta hesar møguleikar nógv betri, serliga tað evropeiska samstarvið.

Henda frágreiðingin gevur ítøkilig uppskot um gransking, menning og nýskapan, sum kann føra Føroyar framá. Tøk mugu takast at stimbra eina mentan av samstarvi og nýhugsan, sum skorðar undir eina mótstøðuføra og burðardygga framtíð fyri komandi ættarlið.

**Tórshavn, november 2024**

**Tórheðin J. Jensen**
Formaður
Ráðið fyri gransking, menning og nýskapan

**Dagmar Joensen-Næs**
Skrivari
Granskingarráðið

# Innihald


**Formæli** 4

**Samandráttur** 6

**1. Avbjóðingar fyri framman** 8

**2. Hvat er gransking, menning og nýskapan?** 11

**3. Støðulýsing** 12

3.1 Hagtøl 12

3.1.1 Gransking og menning 12

3.1.2 Nýskapan 14

3.2 Ph.d. lestur 17

3.3 Altjóða samstarv 18

**4. Meting av almennu gongdini** 20

4.1 Fokusøkir 20

4.2 Karmar 23

4.3 Fígging 23

4.3.1 Gransking og menning 23

4.3.2 Nýskapan 24

4.4 Átøk og skipanir til økta gransking, menning og nýskapan 28

4.5 Útbúgvingar og vitan 31

4.6 Samstarv millum alment og privat 31

4.7 Altjóða samstarv 32

4.8 Altjóða ráðgeving 32

**5. Tilmæli** 34

**Yvirlit: Granskingarstovnar og undirstøðukervi** 36

**Yvirlit: Stuðulsskipanir** 40

# Samandráttur

Stórar broytingar henda í føroyska samfelagnum og úti í heimi, ið krevja nýggjan hugburð og nýggjar loysnir.

Gransking, menning og nýskapan eru týðandi amboð at finna loysnir á teimum avbjóðingum, ið standa fyri framman. Men skal samfelagið fáa ágóðan av gransking, menning og nýskapan, krevur tað strukturellar broytingar, sum byggja á eina grundleggjandi fatan hjá øllum ábyrgdarum av, at gransking, menning og nýskapan eru íløgur, og at átøk og avgerðir eiga at vera vitanargrundað.

Ráðið fyri gransking, menning og nýskapan mælir til, at karmarnir fyri gransking, menning og nýskapan verða betri skipaðir og styrktir, so føroyska samfelagið verður ført fyri at loysa tær stóru samfelagsavbjóðingar, ið liggja fyri framman bæði upp á styttri og longri tíð.

**Størri almennar íløgur í gransking og menning**
Almennu Føroyar brúktu í 2022 0,4 % av BTÚ til gransking og menning. Hetta er alt ov lítið samanborið við grannalond okkara og evropeisk mál.

Játtanin til stuðulsskipanina til gransking, sum Granskingarráðið umsitur, hevur staðið mestsum í stað í 15 ár. Samstundis er lønarlagið hækkað munandi. Játtanin fyri 2024 er økt við 1,5 mió. kr., sum er eitt elalítið fet á rætta leið, men tørvur er enn á munandi hægri játtan.

Játtanir til granskingarstovnar eru eisini alt ov avmarkaðar.

Løgtingið eigur at gera munandi størri íløgur í gransking og menning. Hægri játtanir til gransking og menning gera, at fleiri fáa eina granskaraútbúgving (ph.d.), og útbúnir granskarar saman við viðkomandi pørtum fáa møguleikar at arbeiða við evnum, sum samfelagið hevur tørv á meiri vitan um.

Almennar stuðulsskipanir til gransking, menning og nýskapan eiga at verða savnaðar á einum staði fyri at gagnnýta orkuna til fulnar og veita bestu tænastuna.

**Nýskapanin skal mennast**
Nýskapan hevur alstóran týdning fyri at menna búskapargrundarlagið undir samfelagnum. Skal meira ferð fáast á nýskapan, mugu fortreytirnar betrast.

Menniskjaliga tilfeingið eigur at verða raðfest hægri. Hugskotini, lærdómurin og vitanin hjá føroyingum skulu bera samfelagið longri fram á leið.

Landsstýrið eigur at menna eina heildarstrategi fyri nýskapan og at seta í verk serstøk politisk átøk, ið taka burtur forðingar og stimbra nýskapan. Íblástur til politisk átøk kann fáast í Íslandi, sum seinastu árini hevur lagt stóra áherðslu á at menna nýskapan, serliga á tøkniliga økinum. Politisku átøkini hava millum annað fevnt um altjóða ráðgeving, íløgur, stuðul og skattafyrimunir.

Føroyingar hava servitan á fleiri økjum, m.a. innan sjó- og alivinnu og heilsu. Stórir vakstrarmøguleikar eru eisini á øðrum økjum, m.a. innan tara, matvørur, fiski- og skipaútgerð, KT, ferðavinnu og skapandi vinnur.

Neyðugt verður at fokusera á tey øki, har vit eru sterk, og at fremja sambandið millum gransking og vitan, ið er íkomin av praktiskum royndum.



Um vit sum samfelag skulu vera meiri mótstøðufør í framtíðini, er tó neyðugt við einum meiri fjøltáttaðum búskapi, og dentur eigur tí at verða lagdur á at styrkja alt nýskapanarvirksemi.

**Vitanarstigið skal styrkjast**

Útbúgvingar eru ein týðandi partur av tilgongdini fyri at hækka vitanarstigið. Tørvur er á at styrkja vitanarstigið á ávísum økjum. Royndir í m.a. Danmark, Noregi og USA vísa, at serliga útbúgvingar á tøkniliga og handilsliga økinum hava týdning fyri at menna nýskapan.

Fyri at fáa ferð á vitanardynamikkin innan nýskapan og fáa eina veruliga nýskapanarvistskipan í Føroyum er neyðugt, at nógvir stovnar og feløg arbeiða saman.

Ein depil fyri gransking, menning og nýskapan, har gransking og vinna kunnu virka í felag, eigur at verða skipaður sum partur av Fróðskaparsetrinum, nú arbeitt verður við at savna allar deildir á Frælsinum við kampus og øllum tí, ið hoyrir einum nýmótans universiteti til. Ein slíkur depil kann eisini skipast í Sjóvinnuhúsinum, har eisini Hugskotið, Vinnuframi, Framtak og Filmshúsið halda til.

**Mál fyri luttøku í altjóða samstarvi**

Tað hevur stóran týdning, at Føroyar luttaka í altjóða samstarvi um gransking, menning og nýskapan, sum gevur okkum nýggja vitan og førleikar og sterkari netverk.

Føroyar hava valt at vera við í fleiri útlendskum skipanum, sum geva stovnum og fyritøkum møguleika at søkja stuðul til gransking, menning og nýskapan, men enn gagnnýta vit langt frá skipanirnar til fulnar. Serliga ES-samstarvið hevur nógvar møguleikar, sum eiga at verða troyttir munandi betur.

Eingin yvirskipað ætlan er fyri luttøku okkara í altjóða samstarvi. Landsstýrið eigur at seta yvirskipað og ítøkilig mál fyri luttøku í evropeiskum og norðurlendskum granskingar- og menningarsamstarvi í samskifti við almennu granskingarstovnarnar.

Luttøkan í altjóða samstarvi krevur samskipan og arbeiðsorku, og tilgongdin at søkja um stuðul er ógvuliga krevjandi, ikki minst hjá smærru aktørunum.

Granskingar- og framtakseindin á Fróðskaparsetrinum hevur lætt um arbeiðsbyrðuna hjá granskarum har, men eindin eigur at verða styrkt, og granskarar á øðrum stovnum og privatar fyritøkur eiga eisini at fáa atgongd til hesa tænastu.

# 1. Avbjóðingar fyri framman

Stórar broytingar og avbjóðingar bíða fyri framman, ið fara at krevja broyttan hugburð og øðrvísi loysnir.

Í Føroyum hava vit eina stóra haldførisavbjóðing. Hóast góðar tíðir er búskaparliga haldførið hótt. Inntøkur til samfelagsbúskapin vanta, og tænastur dýrka.

Aldurssamansetingin verður meira og meira skeiklað. Færri børn verða fødd. Nógv ung flyta av landinum, og ov fá venda heim aftur eftir lokna útbúgving. Samstundis gerast tey fleiri í tali, sum hava tørv á umsorgan og heilsuviðgerð. Úrslitið av skeiklaðu aldurssamansetingini er longu nú, at vit mangla arbeiðsmegi innan ávís øki.

Týðandi rák og hendingar úti í heimi hava eisini ávirkan í Føroyum.

Veðurlagið broytist, og tað fær ógvisligar avleiðingar fyri náttúru og samfeløg, eisini á okkara leiðum. Neyðugt verður við átøkum fyri at minka $CO_2$ útlátið, m.a. við at skunda undir grøna orkuskiftið.

Kríggj er í Evropa, Miðeystri og aðra staðni við, og spenta støðan í heiminum skapar nýggjar avbjóðingar á handils- og verjuøkinum. Lond við einaræðisstýri vinna fram, og fólkaræðið stendur fyri hóttafalli nógva staðni.

Samstundis henda stórar broytingar á talgilda økinum, sum fara at kollvelta heimin. Vitlíki vinnur fram í rúkandi ferð, og londini royna at fóta sær í nýggju tøknini, sum gevur stórar fyrimunir, men eisini hevur avbjóðingar við sær. Neyðugt verður at menna førleikarnar á hesum øki miðvíst.

**Gransking, menning og nýskapan skapa loysnir**

Neyðugt er, at vit eru tilvitað um og gera ætlanir fyri, hvussu vit kunnu brynja okkum til eina framtíð við broyttum fortreytum.

Tað kann tykjast lættari at gera, sum vit plaga – at taka avgerðir, gera átøk og skipanir við tí vitan og teimum royndum, vit kenna frammanundan. Men tíðirnar broytast, og tað, sum var galdandi og viðkomandi fyri nøkrum árum síðani, er tað ikki longur. Fortreytirnar hjá vinnulívi, heilsuverki, skúlaverki v.m. broytast áhaldandi og kanska ongantíð skjótari enn júst nú.

Besta amboð, vit hava at brynja okkum til komandi avbjóðingar, er eitt breitt og fjølbroytt vitanartilfeingi. Gransking, menning og nýskapan eru avgerandi fyri at finna loysnir á nýggjum avbjóðingum, ið kunnu tryggja okkara vælferðarsamfelag búskaparliga, samfelagsliga og umhvørvisliga í nógv ár frameftir.




# ST hevur ásett 17 heimsmál fyri burðardyggari menning

Heimsmál nr 8 um sømiligt arbeiði og búskaparvøkstur: At virka fyri varandi, inkluderandi og burðardyggum búskaparvøkstri, fullum og úrtøkugóðum virksemi og sømiligum arbeiði til øll.

**Lutmál 8.2:**

Hægri búskaparligt framleidnisstig skal røkkast við ymisleika, tøkniligari uppstigan og nýskapan, millum annað við at leggja dent á høga virðisøking og geirar við kravmiklari arbeiðsmegi.

**Lutmál 8.3:**

Menningarfremjandi politikkur skal fremjast, ið stimbrar framleiðsluvirksemi, sømiligum størvum, íverksetan, skapandi evnum og nýskapan, og sum virkar fyri at stovna og menna smáar og miðalstórar fyritøkur, millum annað við at geva atgongd til fíggjarligar tænastuveitingar.



Føroyskar fótbóltskvinnur á ráðstevnu í Atlanta, USA. Mynd: Magni Mohr

# Kropslig venjing verjir móti avleiðingum av skiftisárum

Heilsugransking, sum Magni Mohr, professari í arbeiðs- og ítróttarfysiologi, hevur staðið á odda fyri, hevur vakt ans um allan heim og hevur verið við til at bøtt um heilsuna hjá millum annað miðalaldrandi kvinnum.

Nógvar kvinnur fáa munandi verri beinheilsu í skiftisárunum. Ein av trimum kvinnum yvir 50 ár bróta bein sum úrslit av beinbroyskni.

Kanningin hjá Magna Mohr og samstarvsfeløgum hansara vísir, at tað í stóran mun ber til hjá kvinnum, ið eru kropsliga virknar, at varðveita sína beinheilsu, hóast tær fara ígjøgnum skiftisárini.

Magni Mohr fór í 2013 undir eina verkætlan, har 85 miðalaldrandi føroyskar kvinnur, sum ikki vóru kropsliga virknar, vandu fótbólt ella svumu. Eisini var ein kontrollbólkur við, sum ikki broytti livihátt.

Nú 10 ár seinni eru flestu kvinnurnar framvegis virknar og hava stovnað sítt egna fótbóltsfelag, FC Trón.

FC Trón-kvinnurnar, sum nú flestallar eru farnar gjøgnum skiftisárini, hava megnað at varðveitt sína beinheilsu. Summar eru enntá betri fyri, serstakliga í beinunum og niðarlaga í rygginum.

# 2. Hvat er gransking, menning og nýskapan?

Gransking, menning og nýskapan eru hugtøk, sum fyri summi kunnu tykjast fremmand. Ein heldur vanlig fatan er, at hetta er nakað, sum fer fram í rannsóknarstovum, og sum hevur lítlan týdning fyri gerandisdagin ella veruleikan hjá vanliga borgaranum, fyritøkuni ella stovninum í Føroyum.

Men gransking, menning og nýskapan eru nógv meira enn hetta. Tað er at gera royndir, skráseta, greina og greiða frá nýggjari vitan, ið kann nýtast til at gera okkum klókari um eitthvørt, og av tí kunnu vit menna vinnulív, heilsuverk, skúlaverk, almannaverk, byggisið, mentanarlív – snøgt sagt alt samfelagið.

**Gransking og menning**
Tað er umráðandi, at øll gransking er fræls og grundað á kritiska hugsan.

**Gransking og menning** er skapandi og skipað arbeiði við tí endamáli at skapa nýggja vitan og at finna nýggjar hættir at brúka tøka vitan.

Gransking og menning kann býtast sundur í:

**Grundgransking:** Upprunaligar royndir ella ástøðiligt arbeiði, har fremsta endamálið er at menna nýggja vitan og fatan uttan nakra ítøkiliga nýtslu í huga.

**Nýtslugransking:** Upprunaligar kanningar, ið hava sum mál at fáa til vegar nýggja vitan, ið kann nýtast til at røkka ávísum praktiskum málum.

**Menningararbeiði**: Skipað arbeiði, ið er grundað á vitan, sum er fingin til vegar gjøgnum gransking og/ella við praktiskum royndum, við tí endamáli at menna nýtt ella betri tilfar, vørur, tilgongdir, skipanir ella tænastuveitingar.

**Nýskapan og íverksetan**
Nýskapan og íverksetan eru týðandi drívmeg fyri at tryggja búskaparligt mótstøðuføri og skapa búskaparvøkstur.

**Íverksetan** er tilgongd at eyðmerkja møguleikar og stremba eftir at gera teir til veruleika og skapa virðir.

**Nýskapan** er verkseting av nýggjari ella munandi betraðari vøru ella tænastuveiting, tilgongd, nýggjum marknaðarføringarhátti ella nýggjum skipanaðarligum hátti í vinnupraksis, arbeiðsplássi ella uttanhýsis sambondum.

OECD býtir nýskapan upp í fýra vinnubólkar:

| Vinnusløg | Dømi | Gransking og Menning av umsetningi |
|---|---|---|
| Hátøkniligar vinnur | KT, heilivágur, samskifti | 5% |
| Miðal/lágtøkniligar vinnur | Bilar, kemikaliu-framleiðsla | 3% til 5% |
| Miðal/lágtøkniligar vinnur | Alivinna | 0,9% til 3% |
| Lágtøkniligar vinnur | Fiskivinna | 0% til 0,9% |

# 3. Støðulýsing

## 3.1 Hagtøl

Hagstova Føroya hevur savnað og skrásett nýggj hagtøl um gransking, menning og nýskapan í Føroyum í samstarvi við Granskingarráðið. Hagtølini eru fyri 2022.

### 3.1.1 Gransking og menning

Spurnabløð um gransking og menning vórðu send fyritøkum og stovnum í desember 2023. Allir almennir stovnar og allar fyritøkur, ið eru mettar at fremja gransking og menning, vórðu spurd um, í hvønn mun tey fáast við gransking og menning, hvaðani fíggingin til granskingar- og menningarvirksemi stavar, hvussu nógv arbeiðsorka verður nýtt, og innan hvørjar vísindagreinar granskingin og menningin fer fram.

Kanningin fyri 2022 er fyrsta uppteljingin av hagtølum fyri gransking og menning síðani 2003.

Ætlanin er, at spurnakanning um gransking og menning skal gerast árliga.

**Lægri enn í hinum Norðurlondunum**
Í Føroyum varð í 2022 granskað fyri 376 milliónir kr. Tað svarar til 1,5 prosent av bruttatjóðarúrtøkuni (BTÚ).

Útreiðslur til gransking og menning, sum partur av BTÚ




**Kelda:** Hagstova Føroya og Eurostat

Almennir stovnar og fyritøkur í Føroyum brúka munandi meira til gransking og menning á royndarstigi í dag enn fyri 20 árum síðani. Í 2003 varð granskað og ment fyri 0,9 prosent av BTÚ. Vøksturin er sostatt 0,6 prosent-stig.

Hóast vøksturin eru útreiðslurnar í Føroyum til gransking og menning sum partur av BTÚ lægri enn í hinum Norðanlondunum. Í Danmark eru útreiðslurnar 2,9 prosent, í Íslandi 2,7 prosent, í Noregi 1,6 prosent og í Svøríki 3,4 prosent.

Evroparáðið setti í 2000 sum mál, at londini í Evropa skuldu brúka 3 prosent av BTÚ til gransking og menning í 2010.

**Privat feløg størstan vøkstur**
Privatu fyritøkurnar standa fyri meira enn tveimum triðingum av útreiðslunum til gransking og menning í Føroyum.

## Gransking og menning, fremjandi geiri

| | 2022 | |
|---|---|---|
| | **1.000 kr.** | **% av BTÚ** |
| Tilsamans innanveggja GERD | 376.362,20 | 1,5 |
| Vinnufeløg | 273.250,50 | 1,1 |
| Almenni geirin | 68.430,70 | 0,3 |
| Hægri útbúgvingarstovnar | 34.681,00 | 0,1 |
| Privatir felagsskapir | 0,00 | 0,0 |

**GERD:** Samlaðar útreiðslur til gransking og menning á royndarstigi (en: gross domestic expenditure on R&D, stytt GERD)

Privatar fyritøkur granskaðu í 2022 fyri 1,1 prosent av BTÚ, meðan almennir stovnar granskaðu fyri 0,4 prosent.

Tað er stór broyting í mun til 2003, tá privatar fyritøkur stóðu fyri 0,2 prosentum av granskingini og almenni geirin fyri 0,7 prosentum.

Evroparáðið hevur mælt til, at av teimum 3 prosentunum av BTÚ skal tað privata brúka 2 prosent og tað almenna 1 prosent.

**Tað almenna granskar og vinnan mennir**
Tað er munur á virkseminum hjá tí almenna og tí privata. Eins og í øðrum londum fer nærum øll grundgranskingin og partur av nýtslugranskingini fram á Fróðskaparsetrinum og hinum granskingarstovnunum. Partur av nýtslugranskingini og nærum øll menningin fer fram í privata geiranum.

## Gransking og menning skift á slag



## Gransking og menning skift á slag og geira




**Tvær ferðir so nógvir granskarar**
Talið á granskarum í Føroyum er meira enn tvífaldað seinastu 20 árini.

## Starvsfólk, starv og kyn – Ársverk í 2022

| Geiri | Bæði kyn | Kvinnur | Menn |
|---|---|---|---|
| Almenni geirin | 78 | 39 | 38 |
| Hægri útbúgvingarstovnar | 70 | 31 | 39 |
| Vinnufeløg | 128 | 53 | 75 |
| **Tilsamans** | **276** | **123** | **153** |

Í 2022 vórðu tilsamans 276 ársverk innan gransking og menning. Í 2003 vóru 131 ársverk.

Heldur fleiri menn enn kvinnur eru granskarar, 153 menn og 123 kvinnur. Fleiri menn enn kvinnur eru teknikarar og vísindalig hjálparfólk.

## 3.1.2 Nýskapan

Spurnabløð um nýskapan vórðu send øllum størri fyritøkum í Føroyum umframt einum úrvali av smærri fyritøkum úr øllum vinnugreinum í oktober 2023. Fyritøkurnar vórðu spurdar um, í hvønn mun tær menna nýggjar vørur og tænastur til marknaðin, um nýskapanartilgongdir, útreiðslur til nýskapan, fígging av nýskapan, samstarv um nýskapan og arbeiðsgongdir til at fremja nýskapan.

Spurnabløð um nýskapan vórðu eisini send almennum stovnum. Nýskapan innan tað almenna kann vera ein nýggj ella munandi broytt tilgongd ella háttur at skipa arbeiðið, vøru, tænastuveiting ella samskifti við onnur.

Ætlanin er, at spurnakanning um nýskapan skal gerast annað hvørt ár.

**Meira enn helvtin framdu nýskapan**
Føroyar lógu í 2020-2022 ovarlaga í tali av nýskapanarvirknum fyritøkum samanborið við hini Norðurlondini.

## Partur av fyritøkum, sum nýskapa




**Viðmerking:** Fyritøkur, sum hava 10 ella fleiri starvsfólk. Hesi tøl eru altjóða sambærilig. Tey fevna ikki um hesar vinnugreinar: **A:** Landbúnaður, skógrøkt og fiskiveiða **I:** Gisting og matstovuvinna **N**: Umsitingarligar o.l. tænastur.
**Kelda:** Hagstova Føroya og Eurostat

Havast skal í huga, at uppgerðin fevnir um tíðarskeiðið, tá koronufarsóttin rakti, sum hevði stórar avleiðingar fyri flestallar fyritøkur.

**Ovarlaga í útreiðslum til nýskapan av BTÚ**
Føroyar lógu ovarlaga í altjóða sambæriligu hagtølunum fyri útreiðslur til nýskapan í % av BTÚ í 2022.

## Útreiðslur til nýskapan í % av BTÚ 2022

| | Vinnugreinar undantikið A, I og N | Allar vinnugreinar |
|---|---|---|
| Danmark | 0,8% | |
| Svøríki | 0,9% | |
| Finnland | 0,4% | |
| Føroyar | 1,2% | 2,2% |

Altjóða sambæriligu tølini fevna ikki um hesar vinnugreinar: **A:** Landbúnaður, skógrøkt og fiskiveiða **I:** Gisting og matstovuvinna **N:** Umsitingarligar o.l. tænastur

Føroyska bruttotjóðarúrtøkan var í 2022 25,2 mia. kr. Føroyskar fyritøkur høvdu sostatt 546 mió. kr. í útreiðslum til nýskapan, tá allar vinnugreinar eru taldar við.

**Tvær vinnugreinar stóðu fyri meginpartinum av útreiðslunum**

## Útreiðslur til nýskapan í 2022

| | Krónur | Prosent |
|---|---|---|
| Tils. (vinnugrein hjá fyritøku A-N) | 546.428.869 | 100 |
| A Landbúnaður, skógrøkt og fiskiveiða | 250.049.773 | 45,8 |
| B Námsvinna og grótbrot | 0,0 | 0,0 |
| C Framleiðsluvinna | 30.095.012 | 5,5 |
| D El-, gass- og fjarhitaveiting | 0,0 | 0,0 |
| E Vatnveiting; kloakkir og ruskviðgerð | 0,0 | 0,0 |
| F Byggivinna | 13.246.248 | 2,4 |
| G Heil- og smásøla; umvæling av akførum | 46.447.954 | 8,5 |
| H Flutnings- og goymsluvinna | 4.591.645 | 0,8 |
| I Gisting og matstovuvinna | 3.447.345 | 0,6 |
| J Kunning og samskifti | 184.367.898 | 33,7 |
| K Fígging og trygging | 11.150.000 | 2,0 |
| L Søla, útleiga og umsiting av fastognum | 0,0 | 0,0 |
| M Serkøn, vísindalig og tøknilig tænastuveiting | 856.270 | 0,2 |
| N Umsitingarligar o.l. tænastuveitingar | 776.725 | 0,1 |

Í uppgerðini fyri allar vinnugreinar stóðu tvær vinnugreinar fyri 80% av útreiðslunum (A: Landbúnaður, skógrøkt og fiskiveiða og J: Kunning og samskifti).

Stór sveiggj kunnu vera í hagtølunum fyri útreiðslur til nýskapan frá ári til ár. Einstakar stórar nýskapanaríløgur kunnu hava stóra ávirkan á tølini.

## 3.2 Ph.d. lestur

Fróðskaparsetrið, granskingarstovnarnir, almenna fyrisitingin og vinnan hava tørv á vælútbúnum fólki til granskingaruppgávur. Hetta eru í stóran mun fólk við ph.d.-útbúgving.

Granskingarráðið hevur í sínum stuðulsskipanum eins og almennar stuðulsskipanir til gransking í øðrum londum, lagt stóran dent á at stuðla ph.d.-verkætlanum. Tað verður mett sum ein kjarnauppgáva, serliga tí stovnarnir og fyritøkurnar oftast ikki sjálvi hava fíggjarorku til at seta nóg nógv fólk í ph.d.-útbúgvingarstarv í mun til tann tørv, tey hava á fólki til endurnýggjan og víðkan av starvsfólkahópinum.

Granskingarráðið fær á hvørjum ári væl fleiri skikkaðar umsóknir um stuðul til ph.d.-verkætlanir, enn møguligt er at stuðla við árligu játtanini.

**Talið á ph.d. lesandi vaksið munandi**
Sambært skrásetingum hjá Granskingarráðnum hava í minsta lagi 126 fólk í Føroyum og føroyingar uttanlands lokið ph.d.-prógv frá 2014-2023. Av hesum hevur Granskingarráðið stuðlað 56 av verkætlanunum í størri ella minni mun. Í fleiri førum er ph.d.-verkætlanin fíggjað uttanlands burturav, og kandidaturin hevur einki samband havt við Føroyar uttan síni ættarbond.

Talið av ph.d.-kandidatum er vaksið munandi hetta skeiðið samanborið við 2004-2013, tá 90 luku ph.d.-prógv.

Í 10 ára skeiðinum frá 2014-2023 hava 55 menn og 71 kvinnur lokið ph.d.-prógv. Hetta er ein stór broyting í mun til undanfarnu 10 árini frá 2004-2013, tá 51 menn og 39 kvinnur luku ph.d.-prógv.

Av teimum 126 verkætlanunum frá 2014-2023 hava 32 lokið ph.d.-prógv á Fróðskaparsetrinum, meðan hini hava lokið prógv í Norðurlondum ella aðrastaðni. Gongdin seinnu árini er, at alt fleiri ph.d.-lesandi verða innskrivað á Fróðskaparsetrinum.

Fakliga er tríbýtt millum hug- og samfelagsvísindi, heilsuvísindi og náttúruvísindi og tøkni. Heilsuvísindaøkið hevur tikið seg skjótt fram seinnu árini. Granskingarráðið metir, at stuðulin frá Sjúkrakassagrunninum er høvuðsorsøkin til, at tað hevur borið til at sett fleiri fólk við á økinum.

## Ph.d. prógv 2014-2023



## 3.3 Altjóða samstarv

Føroyskir granskingarstovnar og fyritøkur luttaka í nógvum ymiskum altjóða samstarvi um gransking, menning og nýskapan.

**Evropa**
Føroyar hava raðfest evropeiska samstarvið við luttøku í granskingarskránni **Horizon Europe**, sum letur upp fyri luttøku í stórum granskingar- og nýskapanarverkætlanum og skapar netverk í hópatali við luttøku frá fremstu granskarum og nýskaparum í Evropa.

Umframt Horizon Europe verkætlanir kunnu føroyingar eisini søkja um luttøku í COST-netverkum, sum serliga  virka fyri vísindaligari menning av nýggjum hugskotum og framleiðslum í londum, sum ikki avrika eins nógv og framkomnu londini í ES.

Føroyar hava fingið nógva beinleiðis og óbeinleiðis nyttu burtur úr at luttaka í evropeiskum samstarvi og í altjóða netverkum.

Fleiri stovnar og fyritøkur í Føroyum hava fingið stuðul til verkætlanir frá ES, serliga á økjum sum hav og aling. Nakrar av verkætlanunum eru SeaMark, BlueAction, MARINE SABRES, AquaVitae, INTERACT og ArticHubs.

Sum nakað nýtt í Horizon Europe hava Føroyar boðað frá luttøku í tveimum partaløgum, sum eru fíggjað av ES og luttakandi londunum í felagi. Partaløgini, sum Føroyar eru við í, eru SBEP (Sustainable Blue Economy Partnership) og Biodiversa+, sum snýr seg um lívfrøðiligt margfeldi. Føroyska upphæddin, sum er sett av til hesa stuðulsskipan, verður rindað beinleiðis til føroyskan stovn ella fyritøku, ið eydnast at fáa stuðul til verkætlan úr stuðulsskipanini.

Føroyar rindaðu meira fyri at vera við í undanfarnu FP7 og Horizon 2020 avtalunum við ES, enn fingið varð burturúr í fíggjarligum stuðli. Í Horizon Europe sáttmálanum er gjaldsleisturin broyttur, so tað er beinleiðis samband millum gjald og úrtøku. Føroyar rinda nú á leið tað, sum svarar til egna luttøku í Horizon Europe.

Talið av umsóknum um stuðul frá Horizon Europe er alt ov avmarkað í mun til mongu møguleikar, sum eru í skipanini. Føroyskir stovnar og fyritøkur eiga at vera eggjað og stuðlað at gagnnýta skipanina í nógv størri mun.

**Norðurlond**
Føroyar luttaka í norðurlendskum granskingar- og menningarsamstarvi.

Føroyar hava havt eygleiðarastøðu í stýrinum fyri **NordForsk** frá stovnanini í 2005 til 1. januar 2023, tá vit fingu sjálvstøðugan limaskap.

Fíggingin til NordForsk átøkini koma partvís (2/3) frá limalondunum og partvís (1/3) frá Norðurlandaráðnum.

Á løgtingsfíggjarlógini fyri 2024 eru 1,8 mió. kr. settar av til luttøku í NordForsk og arktiskum átøkum í sambandi við altjóða granskingar-og menningarsamstarv. Tað gevur føroyskum umsøkjarum atgongd at søkja stuðul á jøvnum føti við umsøkjarar í hinum norðurlondunum

Við játtanini á løgtingsfíggjarlógini hava Føroyar í 2024 fyri fyrstu ferð bundið seg til at vera við í tveimum átøkum hjá Nordforsk við egnari fígging. Hesi átøk kallast Burðardygg fiskiveiða úr sunnum havi og Burðardygg menning í Arktis.

Føroyar hava eisini sjálvstøðugan limaskap í stýrinum fyri **Nordic Energy Research** og frá 2024 í **Nordic Innovation**.

**Arktis**
Føroyar hava í mong ár verið virknar í millumtjóða granskingarsamstørvum, sum viðvíkja Arktis. Nógv viðkomandi vitan og stórar dátumongdir eru í Føroyum, ið kunnu vera eitt virðismikið íkast til gransking og vitanarmenning í Arktis.

Í 2017 skrivaðu Føroyar undir millumtjóða sáttmála undir Arktiska ráðnum um at styrkja arktiska granskingarsamstarvið. Føroyskir granskarar geva í dag týðandi íkast til gransking um Arktis.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur vegna landsstýrið orðað ein arktiskan politikk, sum setir uttanríkispolitisku kós Føroya sum land í Arktis. Uppskot til samtyktar um arktiska politikk Føroya varð samtykt í Løgtinginum 13. mai 2024[1].

**Havsins áratíggju**
ST hevur lýst árini 2021-2030 sum Havsins áratíggju fyri burðardyggari menning. Endamálið við Havsins áratíggju er at skapa felags karmar kring havvísindi, sum kunnu stuðla londum at røkka heimsmálunum fyri burðardyggari menning í 2030. Átøk skulu setast í verk at fáa eitt reint, burðardygt og mótstøðuført hav. Hvørt landið sær skal røkka málunum við støði í egnum veruleika og raðfestingum.

Føroyar eru síðani 7. februar 2023 partur av felagsnevnd fyri Danmark, Føroyar og Grønland fyri Havsins áratíggju og luttaka í hesum sambandi í fleiri arbeiðsbólkum.

Arbeitt verður við at skipa føroyska arbeiðið við egnari tjóðarnevnd við umboðum fyri stjórnarráð, granskingarumhvørvið og aðrar viðkomandi partar, sum kann samstarva við aðrar tjóðarnevndir í millumtjóða samstarvi.

1. Uppskot til samtyktar um arktiska politikk Føroya.

# 4. Meting av almennu gongdini

Íløgur í gransking, menning og nýskapan menna samfelagið. Við vitan og lærdómi kunnu vit gera kappingarførar og nýskapandi vørur, veita skynsamar og góðar almennar tænastur og tryggja, at fortreytirnar fyri einum tryggum og góðum samfelagi eru tær allarbestu.

Evroparáðið setti í 2000 sum mál, at londini í Evropa skuldu brúka 3% av bruttotjóðar-úrtøkuni (BTÚ) til gransking og menning í 2010. Europaráðið mælti eisini til, at av teimum 3% skal tað privata brúka 2% og tað almenna 1% av BTÚ.

Nýggju hagtølini fyri 2022 vísa, at tað gongur rætta vegin í Føroyum, men enn eru vit langt frá málinum, sum Evroparáðið hevur sett.

Íløgurnar í gransking og menning eru vaksnar úr 0,9% í 2003 til 1,5% í 2022. Tað er helmingurin av tí, ið Evroparáðið mælir til.

Býtið millum alment og privat í Føroyum er væl nærri málinum hjá Evroparáðnum nú enn í 2003. Tá granskaðu privatar fyritøkur fyri 0,2% av BTÚ, meðan almennir stovnar granskaðu fyri 0,7%. Nú hevur privati geirin gjørt eitt risa lop upp á 1,1%. Almenni geirin er hinvegin dragnaður niður á 0,4%.

Hóast støðan er betri enn fyri 20 árum síðani, mugu bæði tað almenna og privata gera størri íløgur í gransking, menning og nýskapan, um vit skulu standa okkum í kappingini við ES-lond um at menna samfelag okkara.

Almennu Føroyar eiga at seta sær ítøkilig mál á økinum við eini neyvari tíðarætlan. Íblástur kann til dømis fáast úr Noregi, sum í løtuni kjakast um, hvat málið skal vera. Norska Granskingarráðið mælir til at semjast um eina kós og økja íløgurnar frá 0,9% til 1,2% av BTÚ næstu 5 árini. Svøríki og Finnland seta sær líknandi og meira framsøkin mál[2].

**Strukturellar broytingar**

Skal samfelagið fáa ágóðan av gransking, menning og nýskapan, krevur tað strukturellar broytingar, sum byggja á eina grundleggjandi fatan hjá øllum ábyrgdarum av, at gransking, menning og nýskapan eru íløgur, og at átøk og avgerðir eiga at vera vitanargrundað, so tað verður møguligt á viðkomandi hátt at meta um góðskuna og úrtøkuna og fáa skynsamari rakstur.

Tíð og orka eigur at verða sett av til at útvega nýggja vitan, tá avgerðir skulu takast, og skipast má eisini fyri, at nýggjar eygleiðingar ella royndir verða loftaðar, skrásettar og greinaðar, so vit kunnu læra, eftirmeta og møguliga tillaga tað, ið er vorðið sett í verk. Gera vit ikki tað, verður arbeitt í blindum, og tað elvir til óskynsamar raðfestingar og vánaligan rakstur.

## 4.1 Fokusøkir

Menniskjaliga tilfeingið er grundleggjandi undir allari gransking og nýskapan og eigur at fáa hægstu raðfesting. Tað eru hugskotini, lærdómurin og vitanin hjá føroyingum, ið skulu bera samfelagið longri fram á leið.

2. Noreg treng ein stor auke i forskingsbudsjetta. Grein á Forskningsradet.no 5.11.2024
Norge trenger svenske forskningstilstander. Grein í Khrono 4.11.2024

# Savna vitan um føroysku náttúruna

Nógvir almennir stovnar savna inn dátur og vitan um føroysku náttúruna, sum kunnu nýtast til fjølbroytt endamál. Hetta eru eitt nú dátur um veðrið, fiska- og fuglastovnar, veiðutøl, laksaframleiðslu, plantur og gróður v.m. Vitanin kann millum annað brúkast sum grundarlag og skjalprógv í náttúrufyrisiting, til forsagnir um fiskastovnar og veðurlagsbroytingar.

Stórt virði er í slíkum dátum í altjóða samstarvi. Íløgur eiga at verða gjørdar í at savna og skipa allar hesar dátur betri, so tær eru frítt atkomuligar og liggja trygt.



Føroyingar hava servitan á fleiri økjum, m.a. innan sjó- og alivinnu, umhvørvi og heilsu.

Nógv gransking og nýskapan fer fram í ali- og fiskivinnuni og millum veitarar til hesar vinnur. Stórir møguleikar eru m.a. innan tara, matvørur og fiski- og skipaútgerð.

Bulurin av vitanini innan sjóøkið er íkomin av praktiskum royndum, men vitanarstovnar og nýskapandi fyritøkur eru eisini tengd at vinnuni.

Aðrar vinnur, sum hava stórar vakstrarmøguleikar, eru KT-vinnan og ferðavinnan.

Vinnur, ið frammanundan eru sterkar, eru í størri mun til reiðar at fremja nýskapan. Sterkar vinnur hava fleiri útbúgvin fólk og nóg mikið av dynamikki millum fleiri fyritøkur, har vitan verður deild millum feløg og fólk í vinnuni.

Líkindini fyri at stovna eina nýggja fyritøku við framgongd eru eisini best í eini vinnu, sum longu er sterk, tí har eru longu kundaskari, veitarar og starvsfólk við royndum frá líknandi fyritøkum.

Um vit sum samfelag skulu vera meiri mótstøðufør í framtíðini, er tó neyðugt við einum meiri fjøltáttaðum búskapi, og dentur eigur tí at verða lagdur á at styrkja alt nýskapanarvirksemi.

Aðrar vinnur, sum hava stórar vakstrarmøguleikar, eru  ferðavinnan og KT-vinnan.

Serliga eigur dentur at verða lagdur á at styrkja vitanarvinnur (IP driven industries), sum umframt KT eisini fevna um m.a. hátøknivinnur, bio- og heilsutøkni og filmsvinnu.

# Fyribyrgja at sjúkur koma inn á smoltstøðir

Granskarar á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni arbeiða í samstarvi við allar tríggjar alifyritøkur í Føroyum við at greina vandan fyri at fáa ymiskar sjúkur inn á smoltstøðirnar.

Alistøðir vilja hava fiskin so leingi sum gjørligt á landi fyri at verja hann móti lús. Men vandi er eisini fyri smittandi sjúkum á smoltstøðum, sum geva felli og mistrivnað. Endamálið við granskingarverkætlanini er at fáa greiði á, hvussu sjúkur eru komnar inn á smoltstøðirnar, og hvussu tær hava rótfest seg har.

Tól verða sett upp ymsa staðni á smoltstøðum, ið taka luftroyndir. Við at savna og kanna luftbitlar ber til at staðfesta, um ávísar smittur liggja og sirkulera í luftini.

Granskingarverkætlanin er partur av  ES-verkætlani RASOPTA, sum Føroyar eru við í. Føroyski parturin snýr seg um fiskaheilsu og skal eftir ætlan enda við, at eitt DNA-kipp verður ment, sum í einum kannar fyri ymiskar sjúkur og vatngóðsku, og harvið verður eitt sera týðandi stýringsamboð í aling á landi.



## 4.2 Karmar

Føroyska samfelagið hevur nakrar fyrimunir, sum geva okkum góðar møguleikar at menn-ast og vaksa sum land og fólk. Landið er lítið, tað er stutt til tey, ið ráða og taka avgerðir, og samfelagið kann lættliga skipast við stórum gjøgnumskygni. Samfelagið er trygt saman-borið við fleiri onnur lond, og politiska skipanin er støðug.

Neyðugt verður tó við betri skipaðum og styrktum kørmum fyri gransking, menning og nýskapan, um vit skulu loysa tær stóru samfelagsavbjóðingar, ið liggja fyri framman bæði upp á styttri og longri tíð.

Fyri at fáa gongd á nýskapan er neyðugt við politiskum átøkum, ið taka burtur forðingar og stimbra nýskapan.

Sambært OECD skulu hesar fortreytir vera til staðar fyri, at nýskapan kann fara fram:

- Skikkað arbeiðsmegi
- Sunt vinnuumhvørvi
- Framleiðsla og útbreiðsla av vitan
- Serstøk politisk átøk, ið stuðla nýskapan og taka burtur forðingar

## 4.3 Fígging

Tørvur er á øktari fígging til gransking, menning og nýskapan.

### 4.3.1 Gransking og menning

Játtanin til stuðulsskipanina til gransking, sum Granskingarráðið umsitur, hevur staðið mestsum í stað í 15 ár. Samstundis er lønarlagið hækkað munandi. Játtanin fyri 2024 er økt við 1,5 mió. kr. úr 7, 5 upp í 9 mió. kr. Tað er eitt elalítið fet á rætta leið, men tørvur er enn á munandi hægri játtan.

Neyðugt er at seta hægri játtanir av til gransking og menning, so fleiri fólk fáa eina gransk-araútbúgving (ph.d.), og eisini útbúnir granskarar fáa fíggjarligar møguleikar fyri at granska á teimum økjum, har okkum tørvar meira vitan.

Almennar stuðulsskipanir til gransking og menning eru skipaðar undir fleiri aðalráðum. Fyri at gagnnýta orkuna til fulnar og veita bestu tænastuna eiga allar stuðulsskipanir at verða savnaðar á einum staði.

Fróðskaparsetrið og møguliga aðrir almennir stovnar og ráð eiga at fáa eina grundjáttan til gransking, bæði til at arbeiða á ávísum raðfestum økjum og at kunna seta nýggj fólk við.

Eisini eigur at verða eggjað til, at privatir grunnar í størri mun verða brúktir sum fíggingar-kelda, eins og gjørt verður í stóran mun í Danmark. Samstundis má tó havast í huga, at privatir grunnar kunnu skeikla almennar raðfestingar.

Alivinnan í Føroyum leggur stóran dent á gransking og menning. Vinnan samstarvar við granskingarstovnar í Føroyum og uttanlands. Eitt dømi er planleggingaram-boðið "LUSIM", sum hevur sum endamál at minka um lúsatrýstið í Føroyum. Arbeiðið byrjaði sum ein ph.d.verkætlan, og seinni varð modellið ment í samstarvi við vinnuna. Í dag ber til at gera detaljeraðar modelleringar av lúsastøðuni á einstøku alibrúkunum og meta um virknaðin av ymiskum avlúsingarstrategium.

## 4.3.2 Nýskapan

Hin mest eyðsýndi veikleikin í føroyska nýskapanarumhvørvinum er, at lítið er til av váðafúsum kapitali í Føroyum. Fleiri smærri fyritøkur brúka nógva orku, tíð og pening til gransking og nýskapan fyri at mennast, men megna ikki at koma víðari við hugskotum og kanningum vegna vantandi fíggjarliga orku.

Serliga er tørvur á váðafúsum fræ-kapitali í tíðarskeiðnum frá tí, at nýggj vøra ella tænasta er skapað og útgivin, til sølan av henni byrjar at skapa inntøkur. Hetta tíðarbilið hava fyritøkur vanliga brúkt alla fyribils fígging, og fá virki og grunnar vilja leggja pening í hjá íverksetum, áðrenn fyritøkan hevur prógvað sítt virði. Hjá nógvum íverksetum endar nýskapanin tí við at fara fyri skeyti. Hetta er serliga galdandi fyri nýskapanir, sum liggja uttan fyri høvuðsvinnurnar.

**Triple Helix - samstarv millum geirar**
Triple Helix myndilin fyri nýskapan verður nógva staðni brúktur í politiska arbeiðinum við at menna einstøku økini og leggja eina samlaða kós.




Triple Helix myndilin greinar samspælið millum granskingarstovnar, vinnu og stjórn. Myndilin vísir m.a., hvussu samanrenningin kann skapa nýggjar stovnar, t.d. tøkniligar menningardeplar og vísindasetur, ið eru karmar um samstarv millum granskingarstovnar, vinnu og stjórn.

**Ísland sum fyrimynd**
Ísland hevur seinastu árini lagt stóra áherðslu á at menna nýskapan, serliga á tøkniliga økinum. Fleiri átøk eru  sett í verk, ið hava stimbrað nýskapan. Politisku átøkini hava millum annað fevnt um altjóða ráðgeving, íløgur og stuðul og skattafyrimunir.

Tað almenna letur stórar upphæddir til nýskapan í Íslandi. Rannis, almenni granskingardepilin, fyrisitur næstan alla almenna fígging og stuðul til gransking, nýskapan, útbúgving og mentan. At stuðulsskipanir verða savnaðar í ein grunn, ger fyrisitingina einfaldari og gjøgnumskygdari, og meira fæst fyri pengarnar. Síðani íslendska stjórnin fór undir miðvíst at stimbra nýskapan, eru nógvir ymiskir aktørar komnir, sum stuðla upp undir nýskapanarvirksemið.



# Møði hjá fiskimonnum elvir til vanlukkur

Gransking skapar vitan, ið kann vera grundarlag undir átøkum, sum bøta um heilsuna og trygdina hjá føroyingum.

Kanningar, sum Annbjørg Abrahamsen, granskari og vinnusálarfrøðingur, hevur staðið fyri, hava víst, at mentalu førleikarnir hjá sjómonnum versna munandi frá byrjan til endan av einum túri. Fatanin av rúmi og rættningi og reaktiónstíðin eru nógv verri móti endanum av túrinum, og minnið er nógv vánaligari.

Annbjørg savnaði í meira enn eitt ár dátur um heilsustøðuna hjá fiskimonnum. Hon var tilsamans 202 dagar á sjónum við 16 ymiskum línuskipum, garnaskipum og trolbátum.

Niðurstøðan av kanningunum var, at fiskimenn eru ein yvirtroyttur bólkur, sum hevur langar arbeiðsdagar, samstundis sum svøvnurin er væl minni enn almennu tilmælini fyri at røkja lívsneyðugar sálarligar og kropsligar funktiónir.

Yvirmøði viðførir øktan vanda fyri vanlukkum og hevur negativar avleiðingar fyri sálarliga og kropsliga heilsu hjá sjómonnum.

**Íløgur í nýskapan – Ísland**

Fyri 5 árum síðani vóru nærum ongir íleggjarar í Íslandi í undan-fræ fasuni (en: pre-seed), har váðin er størstur. Íleggjarar vóru heldur ikki í vakstrar fasuni, har stórar íløgur skulu til. Nú eru nógvir íleggjarar í øllum fasum.




**Lítlar íløgur og stuðul í Føroyum**

Tørvur er á munandi størri íløgum og stuðli, um ferð skal koma á nýskapan í Føroyum.

**Íløgur í nýskapan - Føroyar**




Í Føroyum veita Hugskotið og Íverksetarahúsið karmar og ráðgeving til nýskapan, og nakrir fáir grunnar og fyritøkur gera íløgur í nýskapan.

Í Føroyum er ov lítið til í øllum fasum, serliga í undan-fræ fasuni og fræ-fasuni.



# Fleiri fyrimunir við at stovna fyritøku í Danmark

Føroyska KT-fyritøkan FarPay, ið varð stovnað í 2014, hevur eitt fjølbroytt úrval av talgildum tænastum til bæði feløg og fyritøkur.

FarPay hevur høvuðssæti í Føroyum, men flestu viðskiftafólkini eru í Danmark. Fyritøkan hevur í dag millum annað 60-70 prosent av danska Apoteksverkinum, Berlingske Medier og Zoologisk Have sum viðskiftafólk.

Fyritøkan sær fyri sær stórar vakstarmøguleikar. Ætlanir eru um at seta fleiri starvsfólk komandi tíðina, og í næstum verður flutt í munandi størri hølir í Keypmannahavn.

- Vit hava ikki í løtuni ætlanir um at flyta móðurfelagið til Danmarkar, tí tað hevur stórar skattligar avleiðingar, tá tú fyrst ert komin í gongd við fyritøkuna. Men høvdu vit skula gjørt tað umaftur og stovnað okkara fyritøku í dag, so hevði eg alvorliga umhugsað at gjørt tað í Danmark, tí har eru nógvir fyrimunir, sum ikki eru í Føroyum, sigur Bárður Háskor, ið er ein av stovnarunum av FarPay.

Fleiri skattafyrimunir eru í Danmark, ið hava stóran týdning fyri nýggjar fyritøkur, sum skulu byggjast upp og enn ikki hava yvirskot.

Og um fyritøkan einaferð skal seljast, eru møguleikarnir at finna ein góðan keypara uttanlands munandi størri.

– Tað eru eingir aktørar í Føroyum, ið hava førleika ella áhuga fyri at keypa eina fyritøku sum okkara. Tað, at vit eru uttanfyri ES, ger, at tað eru nógvar skattligar forðingar, sum gera tað ógvuliga komplekst at keypa eina føroyska fyritøku, sigur Bárður Háskor.

**Stuðul til nýskapan - Føroyar**




Í Føroyum verður lítil almennur stuðul veittur til nýskapan. Einasti grunnur, ið kann veita stuðul til allar vinnugreinar, er Vinnuframi[3]. Játtanin hjá Vinnuframa er so lítil, at fleiri áhugaverdar størri verkætlanir bert fáa avmarkaðan stuðul.

Ein møguleiki fyri at menna nýskapan kann vera at fáa ein sterkan nýskapanargrunn. Mælt verður frá at stovna nýggja fyrisitingareind til hetta, men heldur at savna stuðulsskipanirnar í Føroyum innanfyri karmarnar av lógini um ráðgeving og stuðul til gransking, menning og nýskapan[4].

## 4.4 Átøk og skipanir til økta gransking, menning og nýskapan

Serligar skattaskipanir fyri granskingar-, menningar- og nýskapanarvirksemi eru vanligar í okkara grannalondum fyri at eggja til økta gransking, menning og nýskapan. Talan kann bæði vera um frádráttar-, afturberingar- og stuðulsskipanir. Tílíkar skipanir kundu verið settar í verk fyri at stuðla undir fleiri nýskapandi fyritøkur í Føroyum.

Fleiri ymisk viðurskifti eru galdandi, sum ávirka møguleikarnar hjá eini nýskapandi fyritøku at mennast og eydnast. Skipanir kunnu setast í verk, sum stimbra áhugapørtunum í eini nýskapanarfyritøku á ymsan hátt.

### Starvsfólk



Partabrøv

### Eigarar



Skattaviðurskifti
Frádráttir
Partabrøv
Kapitalur

### Íleggjarar



Lóggáva
Tvískattaavtalur
Skattaviðurskifti
Sølumøguleikar

3. Vinnuframi
4. Løgtingslóg nr. 89 frá 7. juni 2020 um ráðgeving og stuðul til gransking, menning og nýskapan

Íslendska fyritøkan Kerecis hevur við at nýta nýggja tøkni ment eina vøru úr fiskaskræðu, sum kann lekja brandsár og aðrar húðløstir við at skapa nýggjar húðkyknur.

Vøran, ið nevnist Kerecis Omega-3 Fish Skin, er góðkend av altjóða heilsumyndugleikum og verður seld í nógvum londum kring heimin.

Danska fyritøkan Coloplast, ið framleiðir læknaliga útgerð, hevur nú keypt Kerecis fyri umleið 9 miliardir krónur.

**Ísland**
Ísland hevur eina stuðulsskipan fyri nýskapanarvirksemi, har nýskapandi fyritøkur fáa ein part av útreiðslunum til nýskapan aftur og í fleiri førum beinleiðis stuðul til hetta virksemið[5]. Skipanin varð sett í verk í 2010 fyri at økja fíggjarliga mótstøðuførið hjá Íslandi við at menna meira vitanargrundað virksemi.

Hendan skipanin hevur havt stóra ávirkan á nýskapanargongdina í Íslandi. Áhugin fyri skipanini hevur verið sera stórur, og bæði smáar og stórar fyritøkur hava gjørt stórar íløgur í nýskapan[6].

Árliga játtanin á íslendsku fíggjarlógini til stuðulsskipanina er vaksin støðugt. Skipanin er júst tillagað eftir tilmæli frá OECD, so hon nú verður tíðaravmarkað til 3 ár fyri hvørja verkætlan, og frádrátturin hjá stórum fyritøkum er lækkaður.

**Danmark**
Fleiri føroyskar nýskapanarfyritøkur hava valt at skráseta síni feløg í Danmark, tí nakrir fyrimunir eru fyri nýskapanarfyritøkur, sum ikki eru í Føroyum.

Fyritøkur í Danmark kunnu fáa skattafrádrátt fyri útreiðslur til royndar- og granskingarvirksemi. Eisini kunnu íverksetarafyritøkur fáa útgoldið skattavirðið av nýskapanarútreiðslum kontant, um hesar útreiðslur eru partur av undirskoti hjá felagnum[7].

Í Føroyum ber einans til at framføra undirskotið hjá felagnum sum ein ágóða til framtíðina. Tá felagið byrjar at vinna pening, verður hetta aktivið ført inn í raksturin, soleiðis at felagið vinnur tapið aftur, innan tað byrjar at gjalda skatt.

Í Danmark kunnu fyritøkur eisini rinda leiðslu og starvsfólki løn við øðrum enn lønarinntøku, t.d. við partabrøvum og forkeypsrætti við lagaligum treytum. Hetta ber ikki til á sama hátt í Føroyum.

Harumframt hevur tað eisini stóran týdning fyri nýskapandi fyritøkur, at tað er munandi lættari at fáa íleggjarar í Danmark, tí flestu íleggjarar kenna ikki Føroyar, og fleiri skattatøkniligar forðingar eru, tí vit ikki eru við í ES.

Samstundis sum fleiri fyrimunir eru við at stovna og byggja upp eina nýskapandi fyritøku í Danmark, má eisini havast í huga, at partafelagsskatturin í Danmark er 22%, meðan hann bert er 18% í Føroyum.

5. Rannis: Tax deduction for Research and Development
6. OECD: Evaluating the effects of the R&D tax credit in Iceland
7. Skattekredit og fradrag for forskning og udvikling



# Føroysk fyritøka á odda fyri nýggjari vinnu

Samstarvsvtalan við ES um gransking og nýskapan gevur føroyskum fyritøkum stórar møguleikar. Ocean Rainforest í Kaldbak, ið er millum fremstu tara-alarar í Evropa, hevur fingið 70 mió. kr. í stuðli frá ES-granskingarskránni Horizon Europe til at standa á odda fyri granskingarverkætlanini SeaMark. Av hesum eru góðar 10 mió. kr. beinleiðis til arbeiðið hjá Ocean Rainforest.

25 altjóða fyritøkur og stovnar eru við í SeaMark-verkætlanini, ið millum annað skal gera royndir við at fáa tara at veksa betur, finna bestu tøknina at ala og skera tara, framleiða ymiskar vørur úr tara, og eyðmerkja avbjóðingar við at fáa vørurnar á marknaðin.

Eisini skal verkætlanin greina heilsuárin av at eta tara og, hvussu evnir í tara kunnu brúkast í kosmetikki og heilivági og sum pakkitilfar. Harumframt skulu árin á umhvørvið kannast, og búskaparligar greiningar gerast av, um tað loysir seg at fara undir taraframleiðslu.

Ocean Rainforest væntar, at taravinnan fer at vaksa á sama hátt, sum vit hava sæð við laksavinnuni og øðrum vinnum.

Gransking er við til at varðveita og styrkja føroyska málið. Í talgilda heimi okkara er gransking í føroyskari máltøkni grundarlag fyri menning av bæði hentum og neyðugum málamboðum.

Á Máltøknideplinum verður savnað inn føroyskt tilfar til at menna og granska í m.a. teldutýðing, talukenning, stórmálmyndlum og góðskutrygging.

Leiðin frá gransking til nýtslu er stutt, og fleiri ítøkilig úrslit av máltøkniligari gransking eru til gleði fyri føroyska málbrúkaran sum forrit og appir.

## 4.5 Útbúgvingar og vitan

Granskingargrundaðar útbúgvingar eru ein týðandi partur av tilgongdini fyri at hækka vitanarstigið. Tørvur er á meiri vitan á fleiri kjarnaøkjum.

Fróðskaparsetrið og aðrir granskingarstovnar framleiða vitan, ið er neyðug fyri samfelagið, eisini innan nýskapan. Royndir í m.a. Danmark, Noregi og USA vísa, at serliga gransking og útbúgving á tøkniliga og handilsliga økinum hava týdning fyri at menna nýskapan. Harumframt má Fróðskaparsetrið eisini í størri mun bjóða lívlanga læring.

Ein ætlan eigur at verða løgd fyri, hvørjar hægri útbúgvingar eiga at verða skipaðar.

## 4.6 Samstarv millum alment og privat

Umráðandi er hjá privatu vinnuni at hava granskingartilknýti til føroysk og/ella útlendsk granskingarumhvørvi.

Fyri at fáa ferð á vitanardynamikkin innan nýskapan og fáa eina veruliga nýskapanar-vistskipan í Føroyum er neyðugt, at nógvir stovnar og feløg arbeiða saman.

Samstarvið millum Fróðskaparsetrið og vinnu- og yrkisútbúgvingarnar eigur at betrast fyri at samansjóða handaligar og akademiskar førleikar í størri mun og fyri at loysa nakrar praktiskar avbjóðingar, m.a. við at fáa fleiri útbúgvin starvsfólk til tað privata og førleika-menna núverandi starvsfólk.

Deplar og partaløg eiga at verða skipað, ið binda saman granskingarstovnar og nýskap-anarumhvørvi og leiðbeina nýskapandi fyritøkum og íverksetarum.

Ein depil fyri gransking, menning og nýskapan eigur at verða settur á stovn sum partur av Fróðskaparsetrinum, nú arbeitt verður við at savna allar deildir á Frælsinum við kampus og øllum tí, ið hoyrir einum nýmótans universiteti til. Ein slíkur depil kann styrkja tvørfakliga samstarvið millum alment og privat, menna góð hugskot um nýggjar loysnir og verða savningarstað fyri granskarar, nýskaparar, vinnu, íverksetar, íleggjarar og lesandi. Depilin kann eisini skipast í Sjóvinnuhúsinum, har Hugskotið, Vinnuframi, Framtak og Filmshúsið halda til.

Tórshavnar kommuna mælir í vinnupolitikkini sínum fyri 2024-2028 til, at kommunan og landið stuðla ætlanum um ein depil, sum kann vera savningarstað fyri granskarar, nýskaparar, vinnu, íverksetarar, íleggjarar og lesandi/lærlingar[8].

Líknandi deplar eru í nógvum londum. Fyrimyndir kunnu vera hugmyndahúsið Gróska[9] og menningardepilin TTO Iceland[10] í Íslandi.

8. Vinnupolitikkur fyri Tórshavnar kommunu
9. Gróska
10. TTO Iceland

## 4.7 Altjóða samstarv

Tað hevur stóran týdning, at Føroyar luttaka í altjóða samstarvi um gransking, menning og nýskapan, sum gevur okkum nýggja vitan og førleikar og sterkari netverk.

Eingin yvirskipað ætlan er fyri luttøku okkara í altjóða samstarvi. Landsstýrið eigur at seta yvirskipað og ítøkilig mál fyri luttøku í evropeiskum og norðurlendskum granskingar- og menningarsamstarvi í samskifti við almennu granskingarstovnarnar.

Føroyar gera vart við seg á altjóða pallinum á fleiri økjum, m.a. innan hav, heilsu, mentan og samfelag, men enn gagnnýta vit ikki útlendsku stuðulsskipanirnar til fulnar, ið vit hava valt at vera við í. Serliga ES-samstarvið hevur nógvar møguleikar, sum eiga at verða troyttir betur.

Luttøkan í altjóða samstarvi krevur samskipan og arbeiðsorku, og tilgongdin at søkja um stuðul er ógvuliga krevjandi, ikki minst hjá smærru aktørunum. Granskingar- og framtakseindin á Fróðskaparsetrinum hevur lætt um arbeiðsbyrðuna hjá granskarum har, men eindin má styrkjast og granskarar á øðrum stovnum og privatar fyritøkur eiga eisini at fáa atgongd til hesa tænastu.

## 4.8 Altjóða ráðgeving

Ein heildarstrategi fyri nýskapan fyri Føroyar kann verða eitt hent amboð til at ráðgeva politisku skipanina um, hvørja leið vit eiga at ganga fyri at mennast í framtíðini. Fyri at fáa gongd á hetta arbeiði kunnu fólk frá ymiskum ábyrgdarøkjum verða sett saman at viðgera ymisk viðkomandi evni.

Ein møguleiki at fáa íblástur til eina heildarstrategi er at fáa ráðgeving frá altjóða serfrøðingum ella at luttaka í einum altjóða menningarprogrammi.

Í Íslandi fingu tey eftir búskaparskrædlið í 2008 eina frágreiðing um íslendska búskapin frá altjóða ráðgevandi fyritøkuni McKinsey & Company, sum mælti til at flyta frá tilfeingisbúskapi til nýskapanarbúskap og at stimbra virðisøking og nýskapan í øllum vinnum.

Ísland luttók eisini í altjóða evnisskránni MIT Reap[11]. Hendan skráin hevur til endamáls at samstarva við fólk í økjum ella londum, til tess at styrkja nýskapanar- og íverksetanarvistskipana fyri at menna búskapin í økimum.

MIT REAP-luttøkan hjálpti Íslandi at leggja eina nýskapanarstrategi, sum m.a. førdi til, at ein váðafúsur íløgugrunnur og ein menningardepil vórðu stovnað.

11. MIT Reap



# Føroyskt grót gevur vitan um lív á Mars

Gransking av føroysku náttúruni er við til at finna svar uppá stórar spurningar sum, um lív er aðrastaðni enn á Jørðini. Føroyski jarðfrøðingurin Uni Árting er millum teirra, sum í løtuni royna at finna fram til, um lív hevur verið á Mars.

Uni Árting, ið starvast á Jarðfeingi, er limur í Mars 2020 vísindatoyminum hjá NASA. Toymið, sum hann er partur av, ger royndir við tólum, sum rúmdarbilurin Perseverance Rover brúkar.

Uni Árting hevur saman við jarðfrøðingum úr fleiri londum savnað royndir av gróti í Tindhólmi, Vágum og í Suðuroynni. Føroyska jarðfrøðin líkist nógv jarðfrøðini á Mars og kann tí vera við til at lýsa tey jarðfrøðiligu viðurskiftini har og møguliga eisini avdúka, um lív hevur verið á Mars.

Uni Árting heldur, at allar fortreytir eru fyri, at lív kann hava verið á Mars, tí byggisteinar til livandi verur eru funnar har.

# 5. Tilmæli

Við støði í almennu gongdini og teimum avbjóðingum, sum føroyska samfelagið hevur og væntandi fer at fáa, hevur Ráðið fyri gransking, menning og nýskapan hesi tilmæli til landsins myndugleikar og avvarðandi stovnar:

1. Landsstýrið mennir eina heildarstrategi fyri nýskapan og setir í verk átøk, ið kunnu stimbra nýskapan, herundir skattafyrimunir til nýskapandi fyritøkur.

2. Landsstýrið setir yvirskipað og ítøkilig mál fyri luttøku í altjóða samstarvi um gransking, menning og nýskapan, og veitir teimum, sum vilja troyta altjóða skipanirnar, fyrisitingarligan stuðul.

3. Løgtingið økir stuðulin til gransking munandi og ásetir karmar fyri hægri almennum stuðli.

4. Landstýrið leggur ætlan fyri, hvørjar hægri útbúgvingar skulu verða skipaðar.

5. Fróðskaparsetrið setir á stovn ein depil fyri gransking, menning og nýskapan í samstarvi við vinnuna og aðrar áhugapartar



# Fjórða ídnaðarkollveltingin

Vitlíki verður nevnt fjórða ídnaðarkollveltingin og ber viðfevndar broytingar við sær um allan heim. Vitlíki ávirkar framleiðslu, útbúgving, arbeiðs- og frítíðarlív – ja, alt samfelagið.

Vitlíki snýr seg um, at skipanir útinna uppgávur, ið krevja menniskjansligt vit. Tøknin handan vitlíki er í dag so framkomin, at skipanir grundaðar á vitlíki kunnu stuðla undir avgerðum, stýra framleiðslu, viðgera tekst og skriva tekst innan flest øll fakøki.

Generativt AI er vítlíki, ið framleiðir nýtt talgilt tilfar. Myndir, filmsbrot og ljóð verða framleidd av teldum burtur úr øðrum tilfari. Trupult verður at síggja mun á tilfari framleitt av menniskjum og teldum.

YVIRLIT:

# Granskingarstovnar og undirstøðukervi

Nógvir almennir stovnar eru í Føroyum, ið hava gransking sum eitt av sínum høvuðsendamálum. Fleiri stovnar eru eisini, sum umsita tilfar, skráir og dátur, ið verða brúktar sum grundarlag fyri gransking.

Nógvir av hesum stovnum hava eisini aðrar uppgávur sum at kunna og ráðgeva landsins myndugleikum um ávís viðurskifti. Nakrir stovnar stuðla gransking fíggjarliga og/ella við tænastum.

## Granskingarstovnar

Í Føroyum hava vit fleiri granskingarstovnar, ið granska innan ávís fakøki. Flestu stovnarnir samstarva við aðrar føroyskar ella útlendskar stovnar um granskingarverkætlanir.

**Fróðskaparsetrið**
Fróðskaparsetur Føroya er einasta universitet í Føroyum. Gransking og undirvísing eru kjarnin í virkseminum hjá Fróðskaparsetrinum. Granskingin hevur til endamáls at menna vísindaliga stigið á Fróðskaparsetrinum og í landinum.

**Fimm deildir eru á Fróðskaparsetrinum:**

- Føroyamálsdeildin
- Søgu- og samfelagsdeildin
- Náttúruvísindadeildin
- Deildin fyri heilsu og sjúkrarøktarvísindi
- Námsvísindadeildin

Granskingarverkætlanir eru knýttar at øllum deildum, og flestu deildir hava fleiri ph.d.-lesandi. Granskingarvirksemið fer ofta fram í samstarvi við vísindafólk á granskingarstovnum í Føroyum og á útlendskum stovnum, serliga á universitetunum í næstu grannalondunum. Samstarv er eisini við onkrar vinnufyritøkur.

**Havstovan**
Havstovan granskar og ger kanningar av føroyskum havumhvørvi og livandi tilfeingi í havinum. Stovnurin ráðgevur og kunnar landsins myndugleikar og almenning um hesi viðurskifti. Fleiri granskingarverkætlanir verða framdar í samstarvi við føroyskar og útlendskar granskingarstovnar.

**Firum**
Firum er alment partafelag, ið granskar, mennir og ráðgevur innan aling av vatnlivandi djórum og plantum og innan biotøkni. Firum veitir eisini tænastur, sum alivinnan kann gagnnýta í alivirkseminum. Fleiri granskingarverkætlanir verða framdar í samstarvi við føroyskar og útlendskar granskingarstovnar og við fyritøkur.

**Heilsugranskingareindin í Sjúkrahúsverkinum**
Heilsugranskingareindin í Sjúkrahúsverkinum er eind undir Sjúkrahúsverkinum, sum er karmur um heilsugransking í Føroyum. Eindin fevnir um gransking, ið hevur verið á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Landssjúkrahúsinum og Ílegusavninum. Fleiri granskingarverkætlanir verða framdar í samstarvi við føroyskar og útlendskar granskingarstovnar.

**Jarðfeingi**
Jarðfeingi fyrisitur, granskar, ráðgevur og breiðir út kunnleika um kolvetni og jarðfrøðilig náttúruvirði. Jarðfeingi granskar í jarðfrøði og náttúrulandafrøði á landi, á havbotninum og í undirgrundini. Fleiri granskingarverkætlanir verða framdar í samstarvi við føroyskar og útlendskar granskingarstovnar.

**Heilsufrøðiliga Starvsstovan**
Heilsufrøðiliga Starvsstovan er eftirlits- og vitanarstovnur fyri mat og djór í Føroyum. Fleiri granskingarverkætlanir verða framdar í samstarvi við føroyskar og útlendskar granskingarstovnar.

**Umhvørvisstovan**
Umhvørvisstovan veitir tænastur og granskar innan náttúru og umhvørvi. Harumframt umsitur Umhvørvisstovan matrikul- og verndarfyrisiting, land- og sjókort. Fleiri granskingarverkætlanir verða framdar í samstarvi við føroyskar og útlendskar granskingarstovnar.

**Búnaðarstovan**
Búnaðarstovan fyrisitur alla almenna jørð, ið ikki er skrásett sum ogn hjá øðrum almennum stovni. Virksemið á Búnaðarstovuni fevnir eisini um landbúnaðarráðgeving, landbúnaðarroyndir og gransking. Nakrar granskingarverkætlanir verða framdar í samstarvi við føroyskar og útlendskar granskingarstovnar.

**Tjóðsavnið**
Tjóðsavnið savnar, skrásetur, varðveitir og granskar í náttúru- og mentanarvirðum landsins. Fleiri granskingarverkætlanir verða framdar í samstarvi við føroyskar og útlendskar granskingarstovnar.

**Veðurstova Føroya**
Veðurstova Føroya ger í samstarvi við DMI veðurforsagnir og veðurávaringar fyri land og sjóøki kring Føroyar. Veðurstovan granskar lokala veðrið, veðurlagið og veðurlagsbroytingar og ger modellkoyringar av m.a. veðri, aldu og streymi.

**Sjókovin**
Sjókovin er ein privatur, sjálvstøðugur, ikki-vinnuligur granskingargrunnur. Endamál grunsins er at stimbra burðardygga menning og nýskapan í føroyskum sjófeingisvinnum við at veita vitanartænastur gjøgnum gransking og luttøku í altjóða verkætlanum. Fleiri granskingarverkætlanir verða framdar í samstarvi við føroyskar og útlendskar granskingarstovnar og fyritøkur.

## Granskingarundirstøðukervi

**Heilsustýrið**
Heilsustýrið er stovnur undir Heilsumálaráðnum, ið skipar heilsufakliga økið í Føroyum og veitir granskingargrundaða ráðgeving við støði í føroyskum heilsu- og samfelagsviðurskiftum. Heilsustýrið mennir og viðger hagtøl og ger heilsufrágreiðingar og greiningar. Stýrið mennir og umsitir heilsuskráir, m.a. Ættarbandsskránna og eina nýggja landssjúklingaskrá, og viðger umsóknir um loyvi til at granska í skráunum.

**Tjóðskjalasavnið**
Tjóðskjalasavnið varðveitir skjøl, ið hava søguligt virði og fyrisitingarligan og rættarligan týdning fyri borgarar og myndugleikar.

**Landsbókasavnið**
Landsbókasavnið er tjóðbókasavn, universitetsbókasavn, vísindabókasavn og høvuðsbókasavn. Savnið savnar allar føroyskar bókmentir og so mikið sum gjørligt av bókmentum um Føroyar. Landsbókasavnið samstarvar eisini við Fróðskaparsetrið og Granskingarráðið um at skráseta og skipa felags goymslu av vísindaútgávum.

**iNOVA**
Granskarasetrið iNOVA er eitt vísindaligt umhvørvi, ið almennir stovnar og privatar fyritøkur hava stovnað við tí endamáli at styrkja vísindaliga undirstøðukervið í Føroyum. Nútímans starvsstovur, framkomin tól og skrivstovur eru á setrinum, har privatar og almennar fyritøkur granska undir sama taki.

**Jákup Sverri**
Jákup Sverri er havrannsóknarskipið hjá Havstovuni. Skipið er sera framkomið og væl útgjørt og lýkur øll nútíðar krøv til kanningar av havumhvørvi og fiskastovnum og til seismiskar kanningar. Jákup Sverri ger nógv sløg av rannsóknum, bæði fyri Havstovuna og fyri onnur áhugaði.

# Bygnaður


LØGMANSSKRIVSTOVAN
Ráðið fyri gransking, menning og nýskapan
Barna- og útbúgvingarmálaráðið
Granskingarráðið
Fróðskaparsetrið
Umhvørvismálaráðið
Umhvørvisstovan
Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið
Fiskivinnuroyndir
Veðurstovan
Havstovan
Heilsumálaráðið
Granskingareindin í Sjúkrahúsverkinum
Heilsustýrið
Almanna- og mentamálaráðið
Tjóðskjalasavnið
Tjóðsavnið
Landsbókasavnið
Fíggjarmálaráðið
Løgmálaráðið
Uttanríkis- og vinnumálaráðið
Vinnuframi
Búnaðarstovan
Heilsufrøðiliga Starvsstovan
Jarðfeingi
Firum
iNOVA

YVIRLIT:

# Stuðulsskipanir

Stuðul verður latin til gransking, menning og nýskapan úr fleiri ymiskum føroyskum og útlendskum grunnum og skipanum.

## Granskingarráðið

Granskingarráðið umsitur Grunnin fyri gransking, menning og nýskapan. Karmarnir um grunnin eru ásettir í løgtingslóg nr. 89 frá 7. juni 2020 um ráðgeving og stuðul til gransking, menning og nýskapan.

Fleiri stuðulsskipanir eru í grunninum.

**Stuðul til gransking**
Granskingarráðið fær á hvørjum ári eina játtan á fíggjarlógini at luta út til stuðul til gransking.

Stuðul verður latin til gransking, ið verður framd av føroyskum granskara, framd í samstarvi við føroyskan granskingarstovn ella mett at hava samfelagsligan týdning fyri Føroyar.

Játtanin verður latin til ph.d.-verkætlanir, verkætlanir, sum eru longri enn 6 mánaðir, og vinnuligar granskingarverkætlanir.

7,5 mió. kr. vóru tøkar til stuðul til gransking í 2023. Í 2024 er játtanin hækkað við 1,5 mió. kr. til 9 mió. kr.

**Játtan á løgtingsfíggjarlógini til stuðul til gransking**

| 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6500 | 7500 | 7500 | 8300 | 8300 | 7500 | 7500 | 7500 | 7500 | 9000 |

Síðani 2002 er stuðul játtaður til umleið 270 verkætlanir úr hesi skipan.

Stuðul verður veittur eina ferð um árið. Umsóknarfreistin er vanliga 15. februar.

**Stuðul til vísindaligar útgávur**
Stuðul til vísindaligar útgávur verður latin frá fæi úr Eik Vísindagrunninum, sum Granskingarráðið fekk í 2015. Stuðul verður fyrst og fremst latin til útgávu av javnlíkamettum (peer reviewed) vísindaverkum um føroysk evni. Granskingarráðið umsitur stuðulsskipanina.

**Stuðul til Arbeiðsmarknaðarátøk**
Stuðul til Arbeiðsmarknaðarátøk verður latin frá fænum hjá avtikna Frítíðargrunninum, ið var 10 mió. kr. Stuðul verður latin til kanningar og gransking í arbeiðsmarknaðarviðurskiftum.

Granskingarráðið umsitur stuðulsskipanina. Stuðul kann verða veittur eina ferð um árið til granskingarverkætlanir og tvær ferðir um árið til kanningarverkætlanir, til játtanin er uppi.

Higartil hava 1 granskingarverkætlan og 6 kanningarverkætlanir fingið játtað stuðul.

**Stuðul til havgransking í Norðuratlantshavi**
Stuðul verður latin til Havgransking í Norðuratlantshavi – MARiNAO - frá eini granskingarskrá, ið danska stjórnin fíggjar, og sum Granskingarráðið umsitur. Endamálið við granskingarskránni er at skapa økta vitan um havumhvørvið í Norðuratlantshavi og at menna samstarvið millum Føroyar, Grønland og Danmark um havgransking.

Í tíðarskeiðinum 2020-2023 vóru 25,5 mió. kr. settar av til skránna á donsku fíggjarlógini. Skráin er síðani víðkað við 39,6 mió. kr. í 2024-2028.

9 granskingarverkætlanir hava higartil fingið tilsamans góðar 30 mió. kr. í stuðli frá granskingarskránni.

**Stuðul til gransking í uttanríkis-, trygdar- og verjupolitikki í Norðuratlantshavi**
Stuðul verður latin til Gransking í uttanríkis-, trygdar- og verjupolitikki í Norðuratlantshavi – FASDiNA - frá eini granskingarskrá, ið danska stjórnin fíggjar, og sum Granskingarráðið umsitur. Endamálið við granskingarskránni er at skapa økta vitan um uttanríkis-, trygdar- og verjupolitikk í Norðuratlantshavi og at menna granskingarsamstarvið millum Føroyar, Grønland og Danmark.

Í tíðarskeiðinum 2023-2026 vóru 10,3 mió. kr settar av til skránna á donsku fíggjarlógini. Skráin er júst víðkað við 8 mió. kr. í 2027-2028.

Higartil hava 2 granskingarverkætlanir fingið tilsamans 5,6 mió kr. í stuðli frá granskingarskránni. Harumframt hava 4 verkætlanir um at skriva greiningarrit (Policy Papers) fingið tilsamans 965.000 kr. í stuðli.

**Avtiknar stuðulsskipanir**
Granskingarráðið hevur umsitið fleiri stuðulsskipanir, sum ikki eru virknar longur:

- Sjúkrakassagrunnurin stuðlaði átøkum og verkætlanum, sum kundu menna heilsuøkið í Føroyum
- Vinnulig ph.d.-gransking veitti stuðul til vinnuligar ph.d.-verkætlanir
- Stuðul til Horizon umsóknir varð latin til arbeiði við ítøkiligum umsóknum til Horizon verkætlanir
- Stuðul til COVID-19 átøk varð latin til granskingarverkætlanir í sambandi við COVID-19

## Aðalráð og aðrir stovnar

**Fiskivinnuroyndir**
Løgtingið játtar á hvørjum ári stuðul til Fiskivinnuroyndir. Endamálið er at stuðla royndum og kanningum, ið menna og økja um framleiðsluna í fiskivinnuni við atliti at lívfrøðiligari, búskaparligari og samfelagsligari burðardyggari gagnnýtslu av havtilfeinginum. Skipanin verður umsitin av Fiskimálaráðnum.

Játtanin hevur sveiggjað seinastu árini frá 4 til 6,5 mió. kr. Játtanin fyri 2024 er 5 mió. kr. Stuðul verður veittur eina ella tvær ferðir um árið.

**Vinnuframi**
Løgtingið játtar á hvørjum ári stuðul til Vinnuframa, ið veitir stuðul til nýskapandi vinnuligar verkætlanir, sum skapa eitt meira fjøltáttað og burðardygt vinnulív.

Í 2023 var játtanin 3,5 mió. kr. Íroknað hesum er játtan til fyrisiting. Játtanin fyri 2024 er óbroytt. Søkjast kann um stuðul átta til níggju ferðir um árið.

**Stuðul til verkætlanir um alternativa orku**
Løgtingið játtar á hvørjum ári stuðul til Verkætlanir um alternativa orku, ið útvega nýggja vitan og royndir um alternativar grønar orkumøguleikar. Talan kann eitt nú vera um kanningar, skjalfesting og praktiskar royndir, sum Jarðfeingi og Umhvørvisstovan kunnu

fremja saman við kommunum, felagsskapum og/ella privatum feløgum. Skipanin verður umsitin av Umhvørvismálaráðnum.

Í 2023 var játtanin 1,8 mió. kr. Játtanin fyri 2024 er óbroytt. Søkjast kann um stuðul eina ferð um árið.

## Privatar stuðulsskipanir

**Føroyagrunnurin**
Føroyagrunnurin frá 1971 er vinnurekandi grunnur, sum millum annað hevur til endamáls at veita stuðul til ídnaðarroyndir innan fiskivinnu, handverk, ídnað og marknaðarkanningar.

Føroyagrunnurin eigur og rekur Norðoya Íløgufelag, sum setur framtakspening í fyritøkur, ið hava útlit fyri munagóðum avkasti.

**Betri stuðul**
Betri stuðulsgrunnurin letur stuðul til gransking. Grunnurin stuðlar serliga gransking, ið kann metast at vera sjúkufyribyrgjandi, skaðafyribyrgjandi ella tryggleikaskapandi í Føroyum. Dentur verður lagdur á tíðaravmarkaðar verkætlanir, ið gera ítøkiligan mun, heldur enn grundgransking.

## Útlendskar stuðulsskipanir

**NordForsk**
NordForsk er stovnur undir Norðurlendska Ráðharraráðnum, sum fíggjar og stuðlar norðurlendskum samstarvi um gransking og granskingarundirstøðukervi og ráðgevur viðvíkjandi norðurlendskum granskingarpolitikki. Føroyar hava síðani 2023 havt sjálvstøðugan limaskap í NordForsk.

**Nordic Innovation**
Nordic Innovation er stovnur undir Norðurlendska Ráðharraráðnum, sum stuðlar íverksetan, nýskapan og kappingarføri hjá norðurlendskum fyritøkum. Føroyar fingu í 2024 sjálvstøðugan limaskap í Nordic Innovation.

**Nordic Energy Research**
Nordic Energy Research er stovnur undir Norðurlendska Ráðharraráðnum, sum stuðlar samstarvi um gransking í orku og orkupolitikki. Føroyar fingu í 2023 sjálvstøðugan limaskap í Nordic Energy Research.

**NORA**
NORA (Nordic Atlantic Cooperation) er millumtjóða samstarv undir Norðurlendska Ráðharraráðnum, ið fevnir um Grønland, Ísland, Føroyar og Strandanoreg. NORA stuðlar verkætlanum, ið økja um samstarvið millum vinnu-, granskingar- og menningarfyritøkur tvørtur um landamørkini.

**Interreg Northern Periphery and Arctic**
Interreg Northern Periphery and Arctic er ein ES-skrá, ið veitir stuðul til millumtjóða samstarvsverkætlanir í Føroyum, Íslandi, Grønlandi og pørtum av Noregi, Svøríki, Finnlandi, Írlandi, Norðurírlandi og Skotlandi. Endamálið er at menna økini við at stuðla nýskapan, íverksetan og vakstrarmøguleikum á burðardyggan hátt.

### Horizon Europe

Horizon Europe er rammuskráin fyri gransking, menning og nýskapan hjá ES fyri 2021-2027. Horizon Europe er grundað á tríggjar súlur og skipað við útboðum, sum eru í samsvari við politisku stevnumiðini hjá ES. Útboðini verða almannakunngjørd í 'work programmes' og kunnu vera 'bottom-up', har granskarin sjálvur velur sítt evni, ella 'top-down', har evnið er fyrireikað frammanundan.

Føroyar hava atlimaskap í Horizon Europe, og føroyskir granskarar, stovnar og fyritøkur kunnu søkja um stuðul og luttaka í evropeiskum verkætlanum á jøvnum føti við samstarvsfelagar í ES-londum og øðrum londum, ið hava samstarvsavtalur við ES.

Formliga samstarvið millum Føroyar og ES um luttøku í evropeiskum rammuskráum byrjaði í 2010, tá ið samstarvsavtalan um gransking kom í gildi. Samstarvið fevndi fyrst um luttøku í FP7 rammuskránni og síðani í Horizon 2020, sum víðkaði samstarvið til gransking, menning og nýskapan. Í mai 2022 varð sáttmálin millum Føroyar og ES um luttøku Føroya í Horizon Europe undirskrivaður.

<table>
<tr><th>Súla 1<br>Dygdarvísindi</th><th colspan="2">Súla 2<br>Altjóða avbjóðingar og evropeiskt vinnuligt kappingarføri</th><th>Súla 3<br>Nýskapandi Evropa</th></tr>
<tr><td>Evropeiska Granskingarráðið (ERC)</td><td rowspan="2">Tyssi</td><td rowspan="2">• Heilsa<br>• Mentan og fevnandi samfelag<br>• Samfelagstrygd<br>• Talgilding, vinna og rúmd<br>• Veðurlag, orka og flytføri<br>• Matur, biobúskapur, náttúrutilfeingi, landbúnaður og umhvørvi</td><td>Evropeiska Nýskapanarráðið (EIC)</td></tr>
<tr><td>Marie Sklodowska-Curie virksemi</td><td>Evropeiskar nýskapanarvistskipanir (EIE)</td></tr>
<tr><td>Granskingar-undirstøðukervi</td><td colspan="2">Partaløg og missiónir</td><td>Evropeiski stovnurin fyri nýskapan og tøkni (EIT)</td></tr>
<tr><td colspan="4">Widening-skráin og stuðul til Evropeiska Granskingarøkið (ERA)</td></tr>
</table>

### COST – Altjóða netverk

COST - European Cooperation in Science and Technology – stuðlar granskingar- og nýskapanarnetverkum innan øll vísindalig og tøknilig øki. Serligur dentur verður lagdur á at menna øki og evni, sum enn ikki hava fingið fótafesti. COST og ES-nevndin hava tætt samstarv. COST stuðlar eisini verkstovum og tiltøkum við denti á at menna førleikar og eggja til samstørv tvørturum fakøkir og landamørk.

Føroyar fingu limaskap í COST sum Near Neighbour Country í november 2022. Tað gevur føroyskum granskarum rætt at luttaka í COST netverkum á jøvnum føti við onnur.

Ráðið fyri gransking, menning og nýskapan